# Glasgentan í Norðurlandahúsinum

**Leygardagin fer Karin Dyhr, sum er kend fyri at hava skrivað bókina, Glaspigen, at halda fyrilestur í Norðurlandahúsinum um langtíðarávirkaninа av kynsligum ágangi ímóti børnum**

KYNSLIGUR ÁGANGUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Kynsligur ágangur ímóti børnum forfylgir teimum langt inn í vaksnamannalívið, men í fyrilestri í Norðurlandahúsinum í morgin fer karin Dyhr at greiða frá, hvussu hon fekk eitt gott lív eftir at pápin hevði misbrúkt hana í barnaárunum*

Í morgin, leygardagin verður sjónligheitsdagur í Føroyum.

Hetta er fyrstu ferð, at hesin dagurin verður hildin í Føroyum og í hesum sambandi fer kendi danski rithøvundurin, Karin Dyhr, at halda fyrilestur um, hvussu kynsligur ágangur ímóti børnum ávirkar tey seinni í lívinum.

Fyrilesturin er frá klokkan 11 til klokkan 15 í morgin og tað verður Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum, sum setir tiltakið. Annars fara Sólva Ford og Bárður á Lakjuni at kryddra dagin við tónleiki og sangi.

Karin Dyhr er serliga kend fyri at hava skrivað bókina, Glaspigen.

- Sum eitt úrslit av afturvendandi kynsligum ágangi frá pápa sínum, gjørdist Karin Dyhr sjúk. Hon gjørdi sítt egna orðaleysa mál- og tá ið sorgin og vónloysið ikki vóru til at bera, skar hon seg í armar og kropp. "Eg skal fáa ilt – blóðið má út".

Í fyrilestri sínum greiðir Karin Dyhr frá um sín bardaga við borderline og meira enn 70 innleggingar á sinnissjúkradeildum, um arr á likam og sál - og um hvussu hon gjørdist frísk og fekk eitt gott lív.

Hetta er fyrstu ferð, at Sjónligheitsdagurin verður hildin í Føroyum. Hugskotið til átakið er sprottin úr danska Synlighedsdagen, sigur Grúgvan, sum fyrireikar tiltakið, í tíðindaskrivi.

## Ikki so lætt

Hóast øktan opinleika á nógvum økjum, er blóðskemd og kynsligur ágangur framvegis nakað, sum vit ikki tosa opið um.

Men hvussu sær so gerandisdagurin hjá kynsliga misbrúktum børnunum út, eftir at tey eru vaksin? Er tað møguligt at lekja álvarsligu sárini frá barnaárunum? Og hvat kann ein sjálvur gera, tá ein er vorðin vaksin?

Tað kemur fyri, at vaksin fólk, sum hava verið fyri kynsligum ágangi í barnaárunum hoyra sínar næstringar siga: "Kanst tú ikki bara leggja tað farna afturum og koma víðari!"

Men so lætt er tað ikki. Kynslig misnýtsla í barnaárunum kann hava nógva ringa ávirkan á gerandisdagin

- Talan er bæði um sálarligar, likamligar og sosialar trupulleikar, sum vísa seg í vaksnamannalívinum sum avleiðing av ágánginum og viðurskiftunum í uppvøkstrinum.

Men tað góða er, at tað ber til at gera nakað við støðuna og tað er hetta, sum Karin Dyhr fer at tosa um.


# Leys størv í Tórshavnar kommunu

www.torshavn.fo

## PEDAGOGUR

**Tórshavnar kommuna søkir vegna Barnagarðin og Vøggustovuna við Velbastaðvegin eftir einum pedagogi til vøggustovu at arbeiða 20 tímar um vikuna at byrja 1. oktober 2009 ella eftir nærri avtalu.**

**Setanarviðurskifti**

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Meiri fæst at vita**

við at venda sær til Monu Rasmussen Mohr, stovnsleiðara, tlf. 30 21 80, ella við at hyggja inn á heimasíðuna á www.dgstvelb.mono.net.

**Umsókn**

saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndum, skal vera hjá Barnagarðinum og Vøggustovuni við Velbastaðvegin, Velbastaðvegur 41, 100 Tórshavn, í seinasta lagi fríggjadagin 18. september 2009.

**Trivnaðarfyrisitingin**

Trivnaðarfyrisitingin veitir politikarunum ráð og vegleiðing og tryggjar, at býráðs- og nevndarsamtyktir og avgerðir á trivnaðarøkinum verða settar í verk og avgreiddar á lógligum og fyrisitingarliga dyggum grundarlagi. Trivnaðarfyrisitingin virkar fyri, at starvsfólkini á trivnaðarøkinum hava eitt gott og mennandi arbeiðspláss. Deildirnar í Trivnaðarfyrisitingini eru Sosiala deild, Barna- og ungdómsdeildin og Mentamáladeildin.

**Onnur leys størv í Tórshavnar Kommuna – Lesið meira á www.torshavn.fo**

**Leiðari til Býarskipanardeildina** – Býarskipanardeildin
Umsóknarfreist 15.10.2009 kl. 15.00

**Dagrøktarar**
Umsóknarfreist 07.09.2009

**Pedagogar** – Dagstovnurin í Øksnagerði
Umsóknarfreist 12.09.2009

**Pedagogur** – Frítíðarskúlin við Løgmannabreyt
Umsóknarfreist 13.09.2009

**Pedagogur** – Barnagarðin og Vøggustovuna við Velbastaðvegin
Umsóknarfreist 25.09.2009

**Býarbókavørður** – Býarbókasavnið
Umsóknarfreist 21.09.2009

**Búskaparfrøðingur** – Fíggjardeildin
Umsóknarfreist 14.09.2009

**Sløkkiliðsfólk** – Sløkkiliðið í Tórshavn
Eingin umsóknarfreist

**TÓRSHAVNAR KOMMUNA ER LANDSINS STØRSTA KOMMUNA.** Í kommununi starvast tilsamans 1400 fólk, harav 130 fólk í sjálvari umsitingini. Vit leggja sera stóran dent á fakliga menning og trivnað. Arbeiðsumhvørvið er fjølbroytt, og vit hava eina nútímans og opnan leiðsluhátt, har starvsfólkamenning er avgerandi. Vit hava ein virknan starvsfólkapolitikk og raðfesta vit somuleiðis innanhýsis samskifti og samskifti við borgaran høgt. Hetta fyri at tú og borgarin altíð skulu kenna tykkum væl í Tórshavnar kommunu. **Les meira um starvsfólkapolitikkin á www.torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA